# Dagstovnur fyri tey fjølbrekaðu

**At síggja til eru tey svørtu sethúsini á Saltnesi sum so mong onnur sethús har á leið**

DAGSTOVNUR
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Teimum dáma sera væl at vera her í sansa-stovuni við ljósi, ljóði og kúlubaði - ovast vm. Bergur, Sarita og Teitur, og fremst Aleks*

**Saltnes**: Innkomin skilir tú beinanvegin, at alt er gjørt fyri at umstøðurnar hjá teim fjølbrekaðu børnunum skulu vera tær bestu.

Her húsast dagliga átta børn, sum fáa alla ta umsorgan, ið tey hava tørv á frá teimum fimm starvsfólkunum og leiðaranum Honnu Juul.

Hesin dagstovnurin varð alment tikin í nýtslu mánadagin, og er hann samstundis fyrsti dagstovnurin av slíkum slagi í Føroyum.

Tá vit vitjaðu stovnin fyrrapartin týsdagin vóru nøkur av starvsfólkunum í ferð við at lesa bøkur við børnunum, onkur var úti og gekk túr, meðan eitt annað starvsfólk spældi á gólvinum við ta einu gentuna.

Her tyktust børnini at trívast, og líkt var til at starvsfólkini vóru hegnisliga vald út til tær krevjandi uppgávurnar, sum ein slíkur stovnur hevur við sær.

## Umlætting

Hesin dagstovnurin byrjaði annars sum ein roynd - eitt dagtilhald - fyri fýra árum síðani.

Úrslitið av hesum var so mikið gott, at avgjørt varð at skipa hetta sum ein dagstovn burturav fyri fjølbrekað børn.

Í dag er stovnurin tí førur fyri at taka ímóti børnum í skúlaaldri - tvs. børnum undir 18 ár. Í løtuni eru børnini í aldrinum 7 til 16 ár.

Hesi børnini ganga í skúlunum á Toftum og í Søldarfirði - á Toftum eru tey í flokki við stuðli, meðan ein serstova finst til tey í skúlanum í Søldarfirði.

Skipanin er hon, at foreldrini koyra tey í skúlan, meðan ein flutningsbussur kemur eftir teimum, fyri at koyra tey til Reiðrið eftir loknan skúladag.

Og tá klokkan er vorðin 17 kom foreldrini eftir teimum. Tey eru so heima til næsta dag.

Ein dag um vikuna verður høvið hjá børnunum at yvirnátta á Reiðrinum. Hetta er at meta sum ein umlætting fyri heimini, tí mikukvøldið kunnu tey sova her á Saltnesi.

Í kjallaranum eru trý kømur, har so trý børn hava møguleika at sova eina nátt um vikuna.

Her finst eisini tað vælumtókta rúmið við kúlubaðnum, har børnini bæði kunnu uppliva ljós og ljóð, meðan tey hugna sær saman við kúlunum.



*Julian er júst innkomin. Hann hevur verið úti og fingið sær fríska luft. Hann verður móttikin av Honnu Juul, leiðara á Reiðrinum*



*Starvsfólkini duga væl at taka sær av børnunum á Reiðrinum. Tað er sum at vera heima ...*